# Helst somu fiskidagar komandi fiskiár

**- Mær kunnugt er tað bara í Føroyum, at tað er tingið, sum ásetir kvotur. Í øllum øðrum londum uttan um okkum er tað ráðharrin sjálvur sum ásetir, hvussu nógv skal fiskast, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*

Klokkan 11 í gjár handaði fiskidaganevndin landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jørgeni Niclasen, tilmælið um fiskidagar fyri komandi fiskiár.

Sosialurin ringdi seint mánakvøldið til Jørgen fyri at fregnast eftir, hvat nevndin sigur í álitinum, men landsstýrismaðurin segði seg ikki hava sæð endaliga tilmæli.

- Eg fái ikki álitið fyrr enn klokkan 11 í morgin, og tástaðni veit eg ítøkiliga, hvat nevndin mælir til, sigur landsstýrismaðurin.

Millum orðini halda vit okkum tó skilja á Jørgeni, at nevndin mælir til sama fiskidagatal sum í verandi fiskiári.

Sum gongdin hevur verið seinastu árini, er nærliggjandi at hugsa sær, at landsstýrismaðurin fer at mæla til óbroytt fiskidagatal fyri komandi fiskiár. Men hetta fáa vit ikki endaliga at vita fyrr enn ólavsøkudag, tá ið uppskotið um fiskidagar ætlandi verður lagt fram á Føroya løgtingi.

### Kunnu spyrja vinnuna

- Eg haldi, hetta er fyrstu ferð, at fjølmiðlarnir eru bodnir at verða við, tá ið fiskidaganevndin handar álit um fiskidagar. Hetta verður gjørt við tí í hyggju, at fjølmiðlarnir kunnu fáa høvi at seta limunum í nevndini spurningar um álitið, soleiðis at hesin parturin av ráðgevingini eisini verður hoyrdur.

Jørgen vísir á, at fiskifrøðingar duga væl at bera fram síni sjónarmið, men heldur, at tað haltar viðhvørt við at fáa sjónarmiðini hjá vinnuni fram.



*Enn vil landsstýrismaðurin ikki siga, hvat hann fer at mæla til i uppskotinum um fiskidagar fyri komandi fiskiár, sum ætlandi verður lagt fyri løgtingið ólavsøkudag. Hugsandi er tó, at hann fer at mæla til óbroytt fiskidagatal*

- Hetta er so tað seinna tilmæli til landsstýrismannin um fiskidagar. Frammanundan hevur Fiskirannsóknarstovan gjørt sítt tilmæli, sum mælir til ein niðurskurð í dagatalinum uppá eini 25%. Vil politiski myndugleikin ikki fremja hendan niðurskurð í einum, kann hann fremjast yvir 2-3 ár, heldur Fiskirannsóknarstovan.

Landsstýrismaðurin vísir á, at seinasta ár snúðu ávaringarnar seg serliga um hýsuna og upsan, men í tilmælinum hesaferð mælir stovnurin serliga til at ansa eftir royndini eftir toski.

### Nærlestur og uppskot

- Eg fari nú saman við Fiskimálastýrinum at nærlesa hesi bæði tilmælini, og síðan fer Fiskimálastýrið at gera eitt tilmæli til mín, soleiðis at uppskot kann orðast um fiskidagarnar fyri komandi fiskiár.

Jørgen sigur, at øll uppskot og allar kunngerðir á fiskivinnuøkinum skulu latast Fiskivinnuráðnum til ummælis, og soleiðis verður eisini við uppskotinum um fiskidagar.

- Hetta sigur lógin, vísir landsstýrismaðurin á.

Fiskivinnuráðið hevur eina rættiliga breiða umboðan, sum fevnir um vinnuna á sjógvi og landi, og haraftrat eru fakfeløg umboðað í ráðnum.

Landsstýrismaðurin sigur, at uppskotið um fiskidagar fyri komandi fiskiár, sum byrjar 1. september, verður lagt fyri tingið ólavsøkudag, og málið er, at tað skal samtykkjast fyri 18. august. Tá ið løgtingið hevur samtykt fiskidag arnar, skal lógin kannast, og allir skulu hava fingið síni fiskiloyvi sendandi fyri 1. september.

- So, eg vóni, at nýggi tingformaðurin vil virka fyri, at lógin - eins og undanfarin ár - verður løgd fram ólavsøkudag, sigur Jørgen.

### Bara í Føroyum

Landsstýrismaðurin vísir á, at honum kunnugt, er tað bara í Føroyum, at tað er tingið, sum ásetir fiskidagar ella kvotur.

- Í øllum øðrum londum uttan um okkum er tað ráðharrin sjálvur, sum ásetir, hvussu nógv skal fiskast, sigur Jørgen Niclasen.

# Ein dagur, sum fær okkum at hugsa…

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Dagur teirra deyðu í ferðsluni fær okkum at hugsa, minnast og gráta.

Hetta er eitt gott tiltak og ein góð áminning um at ansa eftir, tá ið vit ferðast eftir vegunum - antin tað er í bili, á súkklu ella til gongu.

Mong eru deyð í ferðsluni gjøgnum árini, og mong eru spard - ja, onkur kennir seg at hava fingið lívið av nýggjum, tí vinirnir, sum vóru í bilinum, tá ið vanlukkan hendi, lótu lív.

Fólk fara altíð at doyggja í ferðsluni eins væl og á sjónum. Hesum slepst ikki undan, soleingi koyrt verður eftir vegunum og skip sigla á havinum. Men verður farið fram við skynsemi og umhugsni, kunnu vit avmarka talið av deyðum og løstaðum.

Tær nógvu blómurnar, vit sóu eftir vegunum sunnudagin, siga okkum, at her hava ung fólk latið lív - ungdómar, sum høvdu lívið frammfyri sær, men sum doyðu í eini meiningsleysari ferðsluvanlukku.

Eins og blómurnar følna við vegjaðaran, sum dagarnir ganga, helt lívið hjá hesum ungu fólkum uppat. Foreldur, systkin, ommur, abbar og vinfólki eru særd, og tað tekur langa tíð, áðrenn arrini eru heil. Tey fara altíð at síggjast og vera har.

Dagurin teirra deyðu í ferðsluni fær okkum eisini at hugsa um lívið - at lívið er ein virðismikil gáva, sum er fallin okkum í lut, men sum eisini kann takast frá okkum, um vit ikki fara væl um hana.

Latið okkum vera góð við lívið - og hvønn annan, eisini tá ið vit ferðast úti á vegunum, so uppaftur fleiri blómur ikki verða at siggja um eitt ár.

Blómurnar eru vakrar, men nógv vakrari er ungdómurin…



*Blómurnar fram við vegunum á degnum teirra deyðu í ferðsluni eru vakrar, men ungdómurin er nógv vakrari…*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Sambandsflokkurin vendir tummulin niðureftir

**– Tíðin erikki búgvin til at privatisera Fiskavirking og vit taka heldur ikki undir við privatiseringsætlanini hjá Bjarna Djurholm, sigur Alfred Olsen, talsmaður hjá sambandsflokkinum í vinnumálum**

PRIVATISERING
*Áki Bertholdsen*

– Fiskavirking skal ikki privatiserast nú, tí tað er føroyskt vinnulív ikki til reiðar til í løtuni.

Alfred Olsen, løgtingsmaður ger greitt, at sambandsflokkurin tekur ikki undir við at privatisera Føroya Fiskavirking beint nú.

Og tað kemur kanska óvart á tey flestu, tí sambandsflokkurin hevur erð eftir ferð ført fram, at hann er ikki fyri, at tað almenna eigur vinnulív.

Og talsmaðurin hjá sambandsflokkinum í vinnumálum leggur eisini dent á, at hendan aðalhugsjónin hjá flokkinum er als ikki broytt.

Tí leggur hann afturat, at sambandsflokkurin sum so tekur undir við at Fiskavirking skal privatiserast.

– Men tað skal vera ein skynsom privatisering og ætlanini, sum nú fyriliggur, taka vit ikki undir við, sigur Alfred Olsen.

– Í fyrra lagi halda vit, at at Fiskavirking skal varðveitast sum ein eind og tí eru vit ímóti tankanum um at liða hana sundur í fleiri fyritøkur.

– Í øðrum lagi halda vit, at tíðin er ikki búgvin til at privatisera Fiskavirking beint nú.

– Fiskavirking er ein heild, har hvørt virkið hevur hevur sínar serligu uppgávur. Tí skal Fiskavirking síggjast um ein heild og tað er hendan heildin, sum ger Fiskavirking so sterkt og effektivt, sum tað er.

Harafturat kemur, at vit nú fáa fast samband um Vestmannasund og tað ger, at eisini virkið hjá Fiskavirking í Miðvági verður drigið nærri upp í hesa heildina.



*– Sambandsflokkurin tekur ikki undir við ætlanini at privatisera Føroya Fiskavirking í løtuni. Tað er eisini umráðandi, at Fiskavirking verður varðveitt sum ein heild, so at virki ikki verða tikin burturúr og seld fyri seg, sigur Alfred Olsen tingmaður*

### Bitin er ov stórur

Sostatt heldur Sambandsflokkurin, at tað er umráðandi at varðveita Fiskavirking sum eina heild.

Og flokkurin heldur, at hendan heildin er ov stórur biti hjá føroyskum vinnulívi at taka á seg í løtuni.

– Vit eiga at minnast til, at tað eru bara nøkur fá ár síðani, at vit vóru í eini álvarsamari kreppu. Og hóast vit eru komin merkiliga skjótt fyri okkum aftur, hevur vinnulívið enn ikki ment so nógv, at tað ber til at fara undir eina skynsamiliga privatisering av Fiskavirking.

– Tað er neyðugt, at vit fyrst finna okkum sjálvi og fáa fótin fastan, uttan beinanvegin at selja Fiskavirking, "bara tí at tað er farið at geva yvirskot.

– Kanska verður tað um nøkur ár, at vinnulívið verður nóg sterkt til tað eru fyritøkur, sum verða førar fyri at keypa Fiskavirking og varðveita tað sum eina fyritøku. Men í løtuni er tað ikki støðan.Tí skal Fiskavirking heldur ikki privatiserast enn, sigur Alfred Olsen.

### Mugu ikki missa ræðið

Sigur tú við hesum, at Fiskavirking bara skal bjóðast út í Føroyum?

– Summi siga, at vit eiga ikki at vera so bangin fyri útlendskum kapitali. Men vit hava gjørt av at avmarka útlendska kapitalin í vinnulívinum. Eitt nú í alivinnuni á sjónum og skipini.

– Og vit halda ikki, at útlendskur kapitalur eigur at fáa ræði á føroyskum vinnulívið og tann sum eigur 51% av partapengunum í einum vinnutóli, hevur eisini ræði á tí. Tað er kapitalurin, sum stýrir, tað skerst ikki burtur, sigur Alfred Olsen.

Men, hví skal Fiska-virking privatiserast yvirhøvur tá ið hon virkar so væl?

– Vit hava eina aðalhugsjón sum sigur, at tað almenna skal ikki eiga vinnulív, tí tað fremur ikki dynamikkin í vinnulívinum. Eigur tað almenna vinnulív, fer nakað av kappingini og tað tænir ikki vinnulívinum.

– Orsøkin til, at Fiskavirking hevur virkað so væl, er, at vit hava havt fiskamarknaðin, har fiskurin verður boðin út í fríari sølu, har Fiskavirking er í kapping við onnur virki um fisking.

– Tað er orsøkin til, at Fiskavirking ment seg so nógv, sum hon hevur. Tað er tað fría fyritakssemi, sum skapar framgongd, sigur talsmaður sambandsflokksins í vinnumálum.

# Tað er óðamannaverk at privatisera Fiskavirking

**Endamálið við at privatisera Fiskavirking er ikki at menna fyritøkuna, sigur formaður javnaðarfloksins. Og mótmælini frá tjóðveldisflokkinum tekur hann ikki fyri fult**

PRIVATISERING
*Áki Bertholdsen*

– Tað er als ongin orsøk til at privatisera Fiskavirking. Tað er ein fyritøka sum er nógv ment, sum er full av virkisfýsni og sum hevur fingið lønsemi í fiskivinnuna á landi.

Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins, tekur ikki undir við ætlanini hjá landsstýrinum, at privatisera Føroya Fiskavirking.

– Eg dugi ikki at síggja, hví Fiskavirking skal vera tað fyrsta, sum landsstýrið loypir á í sínum privatiseringsherðindum.

Hann sigur, at hevði Fiskavirking verið ein steinrunnin fyritøka, við ongum dynamikki, hevði støðan verið ein onnur og tá kundu vit tosa um privatisering



*– Tjóðveldisflokkurin kundi spart okkum fyri sjónleikinum, har hann letst at vera ímóti at privatisera Fiskavirking og roynir at spæla vinstrahallur, tí hann man fara at eftirlíka fólkaflokkinum aftur hesuferð, sum hann plagar, sigur Jóannes Eidesgaard*

– Men Fiskavirking er júst tað beint øvugta.Tað er ein fyritøka, sum gongur væl og sum hevur megnað at skapa yvirskot.

– Tað er ein skipan, har nøkur sterk virki draga nøkur veikari virki við sær og tí hevur Fiskavirking eisini stóran týdning fyri trivnaðin úti um landið. Og tilsamans er talan um eina eind, sum hevur megnað at skapa eina virðisøking í fiskivinnuni á landi.

– Tí er tað onki, sum talar fyri, at broyta eigaraviðurskiftini í Fiskavirking, tí eg dugi ikki at síggja, at tey hava so stóran týdning. Tað er úrslitið sum telur og úrtslitið ber ikki til at taka frá Fiskavirking. – Tí er tað óðamannaverk at privatisera Fiskavirking, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur, at ikki minst fegnast hann um, at ætlanin miseydnaðist at taka nøkur virki burturúr Fiskavirking og at selja tey fyri seg sjálvi.

– Hevði ætlanin eydnast at liða Fiskavirking sundur, kundi tað skjótt enda við, at tað vórðu tey góðu virkini, sum vórðu seld, ímeðan Fiskavirking kom at sita eftir við teimum virkjunum, sum góvu minst av sær.

– Tí ávarar javnaðarflokkurin staðiliga ímóti hesum slagi av privatisering, sum nú liggur í kortunum, serliga tá ið ætlanin er at liðað Fiskavirking sundur.

Hann saknar esini at vit taka spurningin upp um, hvussu stóran part av vinnulívinum í Føroyum, útlendingar kunnu ogna sær, tí tað heldur hann er ein ógvuliga umráðandi spurningur at fáa greiði á.

### Ongin orsøk at leypa á Fiskavirking

Jóannes Eidesgaard heldur sostatt ikki, at endamálið við eini privatisering er at skapa eina virðisøking.

– Privatiseringin er blivið eitt mál í sær sjálvum, eitt hugsjónarligt mál.

Men hann sigur, at tað kemur ikki óvart á seg, tí samgonguskjalið beinleiðis boðar frá privatiseringunum.

– Tí haldi eg eisini, at tjóðveldisflokkurin kundi spart okkum fyri hesum sjónleikinum, sum teir føra fram, har tey látast at vera ímóti privatiseringini.

– Hasin vørrurin, sum tjóðveldisflokkurin ger, er ikki annað enn at spæla eitt sindur vinstrahallur, men tað tað verður skjótt at hann aftur avdúkar sín veruliga borgarliga lit og hann man fara at eftirlíka fólkaflokkinum aftur hesuferð, sum hann plagar.

At tað so hevur verið politiskt rumbul um Framtaksgrunnin og Fiskavirking heldur hann er eitt annað mál.

– Tað er óheppið, at landsstýrið ikki hevur valt ein formann og eina nevnd í Framtaksgrunninum, har ongin kann seta minsta fingurin á gegnið hjá teimum. Og tað slepst ikki burtur, at eitt sakførararavirkið, sum umboðar ein munandi part av føroyskum vinnulívi, fær gegnistrupulleikar av ov á, sigur Jóannes Eidesgaard.